| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>29. mars 2012 | Blað nr.: **9649**<br>Formansins merki: |
|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato: 29. mars 2012 kl. 20.30**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 52/12-84/12**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Annfinn Brekkstein
Elin Lindenskov
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Maria H. Olsen, sum hevur farloyvi
Rúni Djurhuus

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**55/12** **2012-0178**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 29. mars 2012:** Tikið til eftirtektar.

**56/12** **2012-0664**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2012**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 29. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

**57/12** **2009-0492**

**Viðvíkjandi sølu av grundøki matr. nr. 74c, Kollafirði**

Ætlanin er at selja grundøki.

Talan er um grundøki, sum liggur niðri í gomlu bygdini.

Grundøkið er ikki útgrivið ella planerað.

Vísandi til at talan er um eitt einstakt grundøki, sum ikki liggur í eini sethúsaútstykking, verður mett at rættast er at lýsa grundøkið í fríðari sølu.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at lýsa grundøkið í fríðari sølu.

Keypari rindar fyri tinglýsing.

**Fíggjarnevndin 6. oktober 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og lýsa grundøkið til sølu í fríari sølu.

**Býráðið 21. oktober 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Grundøkið hevur staðið á sølulista í gott ár.

Hóast fyrispurningar hava verið, hevur grundøkið ligið uttan boð.

Nú er so ein keypari, sum hevur bjóðað kr. 220.000,00.

Grundøkið er stórt 463 fermetrar, og verður fermeturprísurin tá kr. 475,00.

**Tilmæli:**
Grundøkið hevur staðið á sølulista í gott ár, og verður mett at boðið samsvarar marknaðarprís.

Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at selja stykkið fyri innkomið boð kr. 220.000,00.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og selja stykkið fyri innkomið boð kr. 220.000,00 og við treytum um tvey ára byggifreist.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

58/12 **2012-0072 GHM**

**Hotel Føroyar: Áheitan um fund til skitsuuppskot til Áarstovutorg, har standmyndin av Áarstovubrøðrunum er miðdepilin**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um at gera eitt torg við Áarstovu, millum Cafe Natúr, Hárfríkan Kvilt, í Gongini og Áarstovu, har ætlanin er at seta standmyndir av Janusi og Hans Andrias Djurhuus sum smádreingir, mál nr. 2012-0072/1.

**Ferðslunevndin 28. februar 2012:** Ferðslunevndin mælir til at taka undir við framløgdu tekningum, dagfest 15.02.2012, við teirri broyting at:

1. Økið skal girðast inni á sama hátt sum økið á Kongabrúnni, sunnan fyri Áarstovu, við atkomu til/frá Gongina.
2. Gongubreytakantur verður gjørdur á sama hátt sum sunnan fyri Áarstovu.

Málið verður beint í teknisku nevnd og fíggjarnevndina til støðutakan.

**Ískoyti:**
Løgdeildin hevur gjørt uppskot til leigusáttmála. Skjal nr. 2012-0072/7.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at leiga økið út til umsøkjara, sí leigusáttmála skjal 2012-0072/7 og kortskjal 2012-0072/6

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og gera 10 ára leigusáttmála um økið.

**Býráðið 29. mars 2012:** Kunnað varð um málið.

59/12 **2012-0610**

**Havastova til Ellisheimið**

Í íløgufíggjarælanini fyri 2012 eru settar 1 mió kr. av til Ellisheimið. Ætlanin við hesi játtan er at byggja havastovu út frá stovuni móti Debesartrøð.

Gerast skal byggiprosjekt og neyðug loyvi fáast til vega. Mett verður skilabest, at hesar fyrireikingar verða gjørdar samstundis og av sama ráðgeva sum ætlaða útbyggingin av goymslu v.m. til køkin á hinaru síðuni.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at játta 1 mió kr. av kontu 2775 Eldrarøkt (løgujáttan) til at gera havastovu til Ellisheimið.

**Sosiala nevnd 13. mars 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at taka undir við sosialu nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**60/12** **2012-0456**

**Graslíki á Tórsvøll**

Heildarætlanin at gera Tórsvøll til altjóða stadion verður framd í samstarvi við Fótbóltssamband Føroya, og komið er til næsta stigið, sum er at leggja graslíki á vøllin.

Sambært kostnaðarmeting hjá LBF frá 12. mars 2012 er kostnaðurin mettur til kr. 7.453.438 við mvg. Kostnaðarmetingin fevnir um:

Byggipláss
Grevstur og burturkoyring
Gravir, leiðingar og tyrving, íroknað hitarør, sprinklaraannlegg og drenleiðingar
Uppfylling – planering
Kantseinar og fundamentir
El-arbeiðið
Teknikhús
Graslíki við sand- og gummifyllu (grønum TP-gummi), íroknað útlagt stoytdoyvingarundirlag, áleið 8400 $m^2$
Fótbóltsmál, 4 stk.full støðd og 4 stk. mini-mál
Prístalsregulering
Ókent umleið
Projektering og eftirlit
Kommunalt MVG 6,25 %

FSF hevur boðað frá, at teir játta 4,5 mió. kr. til at leggja gralsíki á Tórsvøll. FSF og Tórshavnar kommuna verða í felag byggiharrar.

Tórshavnar kommuna tekur grasið/vakstrarlagið av vøllinum og ger alt planeringsarbeiðið, sum endar við, at tað er klárt hjá graslíkisframleiðaranum at

leggja graslíki á. Viðvíkjandi graslíki er at viðmerkja, at FIFA skal standa fyri útbjóðingini av hesum partinum.

Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya fara at gera eina samstarvsavtalu um brúk av vøllinum, sum skal verða klár til góðkenningar áðrenn páskir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at arbeiðið at leggja graslíki á Tórsvøll verður framt sambært ætlanini 12. mars 2012 frá LBF.

Eisini verður mælt til at játta kr. 3.100.000 av íløgum 2012 konto 5775 til graslíki á Tórsvøll.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri, greiddi frá.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 15. mars 2012:** Nevndin hevur ikki viðmerkingar til prosjektið.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. kr. 3.100.000 av íløgum 2012 konto 5775 til graslíki á Tórsvøll.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**61/12** **2009-2173**

**Umbøn um játtan til at dagføra lon 2 í Venjingarskúlanum**.

**Lýsing av málinum - samandráttur**
Í lon 2 í Venjingarskúlanum eru serhøli, sum nú verða umbygd og dagførd. Umbyggingin fór í gongd í fjør og verður sambært tíðarætlanini liðug í viku 37. Tá umbyggingin er liðug, eru hølini til alis- og evnafrøði dagførd og haraftrat verður eitt nýtt høli til fyrilestrar.

Umbyggingin fór í gongd uttan góðkenning frá kommununi, so sum sáttmálin millum Føroya Landsstýrið og Tórshavnar Býráð um býtið av felagsútreiðslunum fyri Læraraskúlan og Venjingarskúlan annars ásetir, og ávís ósemja hevur verið millum kommunuan og Landsverk, sum vegna Mentamálaráðið stendur fyri arbeiðinum. Arbeiðið steðgaði á heysti í fjør vegna manglandi játtan úr

landskassanum, men vísandi til átrokandi tørvin á hølunum til undirvísing hevur kommunan samskift við Mentamálaráðið og Landsverk. Semja er nú gjørd um hetta arbeiðið.

Føroya Læraraskúli og Venjingarskúlin eru ein samogn. Sambært sáttmálanum eru felagsútreiðslurnar býttar millum Læraraskúlan og Venjingarskúlan í lutfallinum 60/40. Sostatt er kommunurnar partur av útreiðslunum til umbyggingina og dagføringina av nevndu serhølum 40% av kostnaðinum.

Kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er 2.585.000 kr. Parturin hjá Tórshavnar kommunu er 1.034.000 kr. Harumframt koma kr. 64.625 í mvg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játtaðar verða 1.034.000 kr. umframt mvg kr. 64.625 av árligu játtanini til dagføring av skúlum konta 4175 til umbyggingina av serhølunum í Venjingarskúlanum.

**Mentamálanevndin 9. mars 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá mentamálanevndini og jatta kr. 1.100.000 av konto 4175.

**Býráðið 24. mars 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
í sambandi við umbygging og dagføring av hølunum til alis- og evnafrøði í Venjingarskúlanum, vóru partarnir samdir um at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku, og inn eru komin tvey undirhondsboð.

Víst verður til mál 2011-1221.

Tilboðini eru hesi:
Allar upphæddir í kr., uttan mvg.

Sp/f Húsavarðartænastan kr. 1.977.689,00

Sp/f DíGJ kr. 2.040.103,70

Ráðgevin hevur gjøgnumgingið tilboðini og mælir til, at tikið verður av lægra tilboðnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við ráðgevanum og taka av lægra tilboðnum, sum er frá Sp/f Húsavarðartænastuni.

**Mentamálanevndin 30. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og gera sáttmála við Sp/f Húsavarðartænastan.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Í 2008 varð ætlan gjørd fyri umbygging av lon 2. Ein innrætting varð gjørd í samráð við A-S Design, sum er veitari av innbúgvi og útgerð til serhøli til lærugreinarnar alis- og evnafrøði. Um sama mundi keyptu skúlarnir útgerð til alis- og evnafrøði, og henda útgerð er keypt til tey skáp, sum vóru í ætlanini til innrætting.

Serhølini eru nú um at vera liðug, og dagførda tilboðið uppá innbúgv og útgerð er á 1.161.301,85 kr. Sambært sáttmálanum um felagsútreiðslur millum Venjingarskúlan og Føroya Læraraskúla verða felagsútreiðslurnar býttar millum Læraraskúlan og Venjingarskúlan í lutfallinum 60 /40. Kommununnar partur av hesum útreiðslum er 40 %, og upphæddin er sostatt 464.520,74 kr. Við mvg er upphæddin 493.553,29 kr.

24. mars í 2011 samtykti býráðið at játta 1.100.000 kr. av konto 4175 til umbyggingina av serhølunum. Biðið verður um, at henda játtan verður hækkað við 493.550 kr. til keyp av innbúgvi og útgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at hækka játtanina til umbygging av serhølunum í Venjingarskúlanum við 493.550 kr. til keyp av innbúgvi og útgerð til hølini, og at hækkanin verður veitt av árligu játtanini til dagføring av skúlum konta 4175.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og hækka játtanina til umbygging av serhølunum í Venjingarskúlanum við 493.550 kr. til keyp av innbúgvi og útgerð til hølini, og at hækkanin verður veitt av árligu játtanini til dagføring av skúlum konta 4175.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**62/12** **<u>2012-0631</u>**

**Svimjihøll til 50 metra hyl**

Havnar Svimjifelag hevur fyri býráðnum javnan víst á tørvin at víðka karmarnar fyri svimjing í Havn. Í heildarætlanini fyri Gundadal, sum varð gjørd í sambandi við útbygging av Tórsvølli sum altjóða stadion, er lagt upp til leinging av verandi svimjihøll. Felagið hevur hinvegin víst á aðra loysn, har bygt verður nýggj høll við 10 geilum, tvs. 25x50 metra hyl, vestanfyri verandi svimjihøll í Gundadali, har sum ÍSF-húsið er í dag.

Í fíggjarætlanini eru kr. 5 mió settar av til at seta í gongd arbeiðið at fyrireika nýggja 50 metra svimjihøll, sum lýkur altjóða krøv, og sum saman við verandi høll nøktar samlaða tørvin á svimjing bæði hjá íðkarum og almenninginum.

Talan er um stóra byggiverkætlan. Til tess at seta í gongd arbeiðið er neyðugt at fáa til vega byggiskrá, har byggiætlanin verður lýst og kravfest, og at fáa gjørt skitsuppskot. Setast skal eisini bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at sett verður bygginevnd til nýggja svimjihøll við 50 metra hyli, sum lýkur altjóða krøv, og at nevndin útvegar byggiskrá og skitsuuppskot. Mælt verður harumframt til at játta kr. 500.000 til endamálið av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan).

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 500.000 til endamálið av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan).

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**63/12** **<u>2012-0631</u>**

**<u>Val av bygginevnd til Svimjihøllina til 50 metra hyl sambært §36 í kommunustýrislógini</u>**

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Jógvan Arge og Bogi Andreasen

**64/12** **<u>2010-0498/9 SG</u>**

**<u>Staðseting av fótbóltsvølli í Hoyvík</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Tørvur er á fótbóltsvøllum í býnum, og m.a. fótbóltsfelagið FC Hoyvík hevur spurt Tórshavnar kommunu, hvørjar framtíðarætlanir kommunan hevur í Hoyvík viðvíkjandi hesum spurningi. Sum støðan er nú, fær felagið, eins og onnur nýggj feløg, einans 'avlopstíðir' til venjingar sínar, og hetta ger, at tað er sera trupult at menna felagið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heita á Byggi- og býarskipanardeildina um at kanna møguleikarnar fyri at staðseta ein fótbóltsvøll í Dalinum Langa, omanfyri Hoyvíkar skúla.

**Mentamálanevndin 3. mars 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Mikael Viderø, býararkitektur, greiðir frá kanningini.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 29. september 2010:** Málið varð umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. november 2010:** Nevndin samtykti at halda fast við staðsetingina av fótbóltsvølli í Hoyvík við skúlan við Løgmannabreyt.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Framlagt og umrøtt.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan frá formanninum, er hetta málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í fíggjarætlanini eru 1,2 mió kr. tøkar til at staðseta og fyrireika fótbóltsvøll í Hoyvík. Víst verður á, at ov trongt er í Gundadali, og at Hoyvík eins og Argir eigur at hava egnan fótbóltsvøll til sítt felagslið.

Til tess at fyrireka fótbóltsvøllin, sum skal lúka krøvini hjá FSF, skal gerast tekniskt prosjekt og endaliga kostnaðarmeting. Arbeiðið at gera sjálvan vøllin kann somuleiðis byrja innanfyri givna fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1,2 mió kr. av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til at fáa til vega tekniskt prosjekt og kostnaðarmeting av fótbóltsvølli í Hoyvík og at fáa byrjað sjálvt arbeiðið at gera vøllin.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus samtyktu at játta kr. 1,2 mió. av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til

1) at eftirkanna staðsetingarmøguleikarnar
2) at fáa til vega tekniskt prosjekt og kostnaðarmeting
3) at fáa byrjað sjálvt arbeiðið at gera vøllin

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannsen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1,2 mió. av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til

at eftirkanna staðsetingarmøguleikarnar
at fáa til vega tekniskt prosjekt og kostnaðarmeting
at fáa byrjað sjálvt arbeiðið at gera vøllin.

**Býráðið 29. mars 2012:** Býráðið samtykti at taka undir við fíggjarnevndini, at játta 1,2 mió. kr. av konto 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til at byrja málið við at eftirkanna staðsetingarnar og leggja málið fyri faknevndir og býráðið til endaliga góðkenning, innan projekt verður gjørt.

**65/12** **2012-0632**

**Býarbókasavnið**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býarbókasavnið varð í 2010 og 2011 lutvíst umbygt i kjallaranum og veghæddini. Í fíggjarætlanini fyri 2012 eru settar 1,5 mió, og sambært fíggjarætlanartekstinum er tað til framhaldandi dagføring, serliga kjallaranum. Endamálið er at víðka um virksemismøguleikarnar og gera býarbókasavnið enn sjónligari og virknari í gongugøtuni.

Ynskiligt hevði verið við heildarætlan fyri allan bygningin, so at virksemið bæði í mun til starvsfólk og tænastur til tey vitjandi, børn sum vaksin, kann skipast betri enn í dag.

Kjallarin er lutvíst myrkur (móti gongugøtuni, trappa niður frá café-økinum). Hin parturin, sum vendir móti Tórsgøtu, fær hinvegin gott dagsljós og er lutfalsliga

stórur, eins og at niðurgongd er gjøgnum høvuðstrappuna. Myrki og ljósi parturin kann møguliga skiljast heilt sundur í tvey sjálvstøðug rúm.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1,5 mió av kontu 5475 Býarbókasavnið (løgujáttan) til framhaldandi dagføring serliga av kjallaranum.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Svend Højgaard, býarbókavørður, greiddi frá.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1,5 mió av kontu 5475 Býarbókasavnið (løgujáttan) til framhaldandi dagføring serliga av kjallaranum.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**66/12** **2012-0328**

**Klæðing av saltsølu bygninginum á matr. nr. 970e og Bacalao bygningunum á matr. nr. 970c og 970d.**

**Saltsølu bygningurin á matr. nr. 970e**
Tórshavnar havn keypti bygningin í 1994. Grundarealið er 1.765 m$^2$, og tann samlaða gólvvíddin er um 6.000 m$^2$ í 5 hæddum, við undantak av sjálvari saltsiloini.

Bygningurin stendur í 3. grundumráði, og er umráðisparturin lagdur av til vinnuendamál, ið hava samband við skipaferðslu og fiskiskap, og til virksemi, ið hava samband við hesi....

Bygningurin verður nú útleigaður til goymslu, rágevarar, verkstøð o.a. Fram til summarið 2011 leigaði M.J.Saltsøla siloina, tá teir valdu at flyta á annað stað.

Partar av bygninginum eru í so vánaligu standi, at tað ber ikki til at leiga út.

Um bygningurin skal kunna brúkast framyvir, er neyðugt at skifta vindeygu og hurðar og at bjálva og klaga allan bygningin. Hetta arbeiðið skal gerast soleiðis, at bygningurin skal kunna brúkast til ymisk vinnuendamál.

Tá bygningurin er klæddur, er møguligt at inrætta bygningin eftir tørvi, tó eftir einum leisti, har støða er tikin til felags fasilitetir og bruna teknisk krøv.

Selmar Nilsen arkitektur stóð fyri at skráseta bygningin í 2006.

**Bacalao bygningarnir á matr. nr. 970c og 970d:**
Tórshavnar havn keypti bygningarnar á vári í 2011. Talan er um tveir bygningar við einum samlaðum grundarealið upp á 4.300 m$^2$ og einari samlaðari gólvvídd upp á 12.400 m$^2$.

Stórur partur av bygningunum verða brúktir til landing af feskum fiski, frostgoymslu og meirvirking av fiski. Ein annar partur av bygninginum kann brúkast til skrivstovuvirksemi, goymslu ella annað.

Tøkini er nýggj, men partar av vindeygum og hurðum má skiftast.

Bygningarnir, sum eru úr betong, brúka nógvan hita, og neyðugt er tí at bjálva og klæða, so bygningarnir kunnu blíva heitir og turrir.

Miðja verður eftir at bjóða arbeiðið út áðrenn summarfrítíðina 2012.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at arbeiða víðari við einum uppskoti til at klæða bygningarnar. Arbeiðið at fyrireika uppskotið verður fíggjað av rakstri.

**Havnarnevndin 13. februar 2012:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum.

Skitsuuppskot er gjørt.

**Saltsølubygningurin:**
Bygningurin er bygdur í fleiri stigum, og sæst hetta afur í fasaduni á bygninginum. Í uppskotinum verður bygningurin strammaður upp, so hann nú er meira ein heild.

Allur bygningurin verður klæddur av nýggjum við nýggjum hurðum og vindeygum.

**Bacalao bygningarnir:**
Í fyrsta umfari er ætlanin at klæða suðursíðurnar á báðum bygningunum, tær sum venda móti sjónum.

Uppskotið leggur upp til at styrkja verðandi identitet.

Samlaður kostnaður fyri klæðing av Saltsølubygninginum og Bacalao er mettur til 20 mió. kr., sum skal fíggjast av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2012.

Kostnaður fyri projektering er 1.1 mió.kr.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til:
at taka undir við skitsuuppskotinum
at játta kr. 1.060.000,- til projektering
at bjóða arbeiðið út.

**Havnarnevndin 19. mars 2012:** Samtykt at taka undir við skitsuuppskotinum. Eisini samtykt at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at játta 1,1 mió kr til projektering og at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini játta 1,1 mió kr til projektering og at bjóða arbeiðið út í innbodnari licitatión.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**67/12** **<u>2012-0692</u>**

**<u>Keyp av ognunum matr.nr 220c og matr. nr 224a</u>**

Talan er um tvey matr nr. 220c á 45 $m^2$ og matr nr. 224a á 620 $m^2$, á ognunum stendur ein bygningur.
Ognirnar liggja millum Múllers Pakkhús og skipasmiðjuna MEST við ástandandi bygningi, sum er brendur.

Tað hava verið tingingar við verðandi eigara, sum er Eik, og vilja teir selja fyri 1,1 mió, sum er fyri ogninar við ástandandi húsi, sum tey nú standa.

Eftir byggisamtyktini, liggja ognirnar á havnaøki, og ganga heilt oman í sjógv.

Um ogninar verða keyptar, má húsið takast niður og økið hampast, og er hetta mett til kr. 200.000,-

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:**
Mælt verður til at keypa ognirnar fyri 1,1 mió. og at játta kr. 200.000,- til burturbeining av bygningunum og regulering av økinum, at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2012.

**Havnarnevndin 19. mars 2012:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og keypa ognirnar fyri 1,1 mió. og at játta kr. 200.000,- til burturbeining av bygningunum og regulering av økinum, at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2012.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**68/12** **2012-0823**

**Val av valnevnd til býráðsvalið 13. november 2012**

Sbrt. § 3, stk. 1, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, verður býráðsval fyriskipað og fyrireikað undir leiðslu av eini valnevnd, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Niels Nattestad, Ingibjørg Berg, Jóan Petur Hentze og Eli Christiansen.

**69/12** **2012-0824**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 13. november 2012**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Bjørgfríð Ludvig, Christian Christiansen, Birgith Dahl Bærentsen og Guðrið Rubeksen.

**70/12** **2012-0825**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kollafjørður til býráðsvalið 13. november 2012**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Kollafjørður til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Elna Debess, Marian Jacobsen, Christian Martin Dam og Arnbjørn Kristiansen.

**71/12 2012-0826**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Argir til býráðsvalið 13. november 2012**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Argir til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Gunnar Reynslág, Zacharias Johansen, Jens Peter Johansen og Bjarni Skaalum.

72/12 **2012-0827**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Hestur til býráðsvalið 13. november 2012**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Hestur til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Jacob Pauli Silvurstein, Fríðbjørg Zachariasen, Petur Lyngvej og Sanna Silvurstein.

73/12 **2012-0828**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kaldbak og Kaldbaksbotnur til býráðsvalið 13. november 2012**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Kaldbak og Kaldbaksbotnur til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Jórun Petersen, Johannis Petersen, Petur Skeel Nolsøe og Snorri á Bøgarði.

74/12 **2012-0829**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Nólsoy til býráðsvalið 13. november 2012**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Nólsoy til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Sune Hansen, Kirsten Jacobsen, Anny Niclasen og Mikkjal Holm.

75/12 **2012-0830**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Velbastaðar, Kirkjubø og Syðradalur til býráðsvalið 13. november 2012**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Velbastaðar, Kirkjubø og Syðradalur og Kaldbaksbotnur til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Jógvan Frýdal, Ragnhild Sandoy, Súsanna Andreasen og Bjarnhild Patursson.

76/12 **2012-0831**

**Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval á Argjum**

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Gunnar Reynslág, Zacharias Johansen, Jens Peter Johansen og Bjarni Skaalum.

77/12 **2012-0832**

**Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Kollafirði**

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Elna Debess, Arnbjørn Kristiansen, Christian Martin Dam og Marian Jacobsen.

78/12 **2012-0198**

**Val av limum og varalimum í stýrið fyri Lágargarð fyri 2 ár.**

Hesir limir standa fyri vali:

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Ronald Poulsen | Ása Poulsen |
| Ann Elisabeth Joensen | Jákup Danielsen |

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu:

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Ronald Poulsen | Ása Poulsen |
| Ann Elisabeth Joensen | Jákup Danielsen |

79/12 **2012-0211**

**Tvey nýggj gøtunøvn í sambandi við serstaka byggisamtykt fyri Marknagil**

Býarskipanardeildin heitir á gøtunavnanevndina um at koma við uppskotum til tvey nýggj gøtunøvn í sambandi við m.a. bygging av nýggjum miðnámsskúladepli í Marknagili og skipan av bygging á økinum, sum fevnt er av serstakari byggisamtykt fyri økið við Marknagil.

Í serstøku byggisamtyktini, § 2 stk. 1 og 2 stendur:

*"§2. Frágreiðing um økið*
*Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa økið við Marknagil til miðnámsskúla, fólkaskúla, ítróttarbygging og miðstaðarbygging/bústøðum og hartil hoyrandi veganet, parkeringspláss og fríøki.*

*Stk. 2. Økið er avmarkað av Marknagilsvegnum, Landavegnum, útstykkingini í Svanga og útstykkingini við Perskonugøtu, og er uml. 187.000 m2 til støddar."*

Talan verður um nøvn til tveir vegir. Annar hevur innkoyring frá Marknagilsvegnum, á leiðini har Skúlaheimið og Føroya Handilsskúli eru, og verður í sambandi við nýggja miðnámsskúladepilin, ið byggjast skal. Hin vegurin fer at hava innkoyring frá Landavegnum, har Dagstovnurin við Landavegin er.

**Gøtunavnanevndin 26. januar 2012:** Ymiskt tilfar var fingið til vegar til fundin, og nøkur uppskot vórðu umrødd. Nevndin er samd um, at talan er um serstøk

gøtunøvn, sum fara at verða nógv brúkt millum manna, serliga við miðnámsskúlan, har nógv ung fólk skulu halda til. Tískil er neyðugt at finna nøvn, ið eru viðkomandi og neyv og sum hóska til økið. Nevndin gjørdi av at halda fram við viðgerðini á næsta fundi.

**Gøtunavnanevndin 23. februar 2012:** Nevndin mælir til at nevna vegirnar eftir skaldabrøðrunum og havnarmonnunum Janusi og Hans Andriasi Djurhuus, soleiðis at:

- vegurin við innkoyring frá Marknagilsvegnum verður nevndur "Janusargøta", og

- vegurin við innkoyring frá Landavegnum verður nevndur "Hans Andriasar gøta".

Semja er um at mæla til undirtitlar, tí tá ið bara fornavn er í gøtunavni, er ikki nóg greitt, hvør persónurin er. Mælt verður til, at Janusargøta fær undirtittulin «1881-1948 Janus Djurhuus, løgfrøðingur og skald» og at Hans Andriasar gøta fær undirtittulin «1883-1951 Hans Andrias Djurhuus, lærari og skald»

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við gøtunøvnunum "Janusargøta" og "Hans Andriasar gøta".

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**80/12** **2011-2759 MV**

**Við heimild í Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009**

**Reglugerð um skelting**

Innihaldsyvirlit.

1. kap. Gildisøki s. 1

2. kap. Hugtøk og sundurbýti s. 2

3. kap. Umsóknir og loyvisveiting s. 3

4. kap. Eftirlit s. 3

5. kap. Skelti, ið eru treytað av loyvum s. 3 - 4

6. kap. Skelti, ið eru forboðin s. 5 - 6

7. kap. Almennar viðtøkur s. 6 - 7

8. kap. Fyribils viðtøkur s. 7 - 8

9. kap. Heimild til undantøk s. 8

10. kap. Revsiviðtøkur s. 8

11. kap. Gildisviðtøkur s. 8

Ískoyti I Útgreining s. 8 - 9

Ískoyti II Skelti, ið ikki eru treytað av loyvum s. 9 - 10

## 1. Kap.
## Gildisøki

1.1 Reglugerðin er galdandi fyri Tórshavnar kommunu.

1.1.1 Reglugerðin, við seinni broytingum, fevnir um øll sløg av skeltum og lýsingum og broytingar av teimum, sum loyvi verður søkt um hjá byggimyndugleikunum, eftir at reglugerðin kom í gildi.

1.2 Undantiknar viðtøkum í reglugerðini eru tó:
a) Lýsingar á akførum
b) Lýsingar innanhýsis, sum eru settar í minsta lagi ein metur innan fyri vindeyga ella hurðarop, og síggjast uttanífrá.
c) Lýsingar á ítróttarøkjum.

1.2.1 Hvør tann, ið hevur serligan áhuga fyri tí, kann innan tríggjar mánaðar frá tí, hann var kunnigur um avgerðina hjá byggimyndugleikunum, viðvíkjandi lýsingarskelti, kæra avgerðina til Føroya landsstýri.

## kap.
## Hugtøk og sundurbýti.

1.2.2 Orð, sum skelti og lýsingar, og onnur samsvarandi orð, eru í hesi samtykt at skilja sum alt slag av teksti, myndum ella myndaverkum, og tilhoyrandi lýsingaruppsetingum, bordum, uppsløgum og øðrum líknandi tilfari, ið er ætlað at vekja ans hjá fólki fyri vørum, tænastum ella onkrum slag av virksemi. Uttan mun til um tey eru til at flyta ella føst, um tey skulu vera verandi í longri ella styttri tíðarskeið, um tey eru á privatum øki, almennum øki ella bygningum, ella hvussu tey eru sett upp, t.d. málað á húsaveggir, myndað við ljósútbúnaði, ella á annan líknandi hátt.

1.2.3 Skilað verður ímillum aktiv skeltir og passiv skeltir. Passiv skeltir eru skeltir, har skeltisflatan ella lýsingin sjálv, ikki er úr ljósútbúnaði, men kann vera lýst á. Aktiv skeltir, eru skeltir ella lýsingartól, nærri útgreinaðið sum flættiskeltir og ljósskeltir.

1.2.4 Flættiskelti er at skilja sum skelti, har myndin sjálvvirkandi skiftir við stuttum millumbili, blunkandi ljós og/ella rørslumyndir.

1.2.5 Ljósskelti er at skilja sum skelti, har skap ella tekstur er myndað við ljósi, ella á annan líknandi hátt. t.d. neonskelti ella ljóstekstur, ið flytur seg.

1.2.6 Fyribilsskelti er at skilja sum skelti, ið er tengt at einhvørjum tiltaki, ella lýsing, sum t.d. hevur samband við hátíðir, framsýningar, val, ráðstevnur, stevnur og kappingar. Og skelti, sum eru sett upp vegna bygging ella vegagerð, og t.d. kunngera, hvør ið hevur ábyrgd og eftirlit við arbeiðinum. Fyribilsskelti eru eisini øll skelti, ið kunnu flytast og ikki eru varandi fest á jørðina ella bygningar.

1.2.7 Upplýsingarskelti og kunningarskelti eru at skilja sum skelti, ið eru sett upp til at upplýsa og kunna um friðað øki, almenn øki, urtagarðsøki og spæliøki. Skeltir, sum kommunan metir hoyrir náttúrliga til upplýsing ella kunning um ferðavinnu, søvn og aðrar almennar stovnar.

1.2.8 Uppslag er at skilja sum plakat, ið kann límast ella festast á húsaveggir.

1.2.9 Virkis- og tænastuskelti er at skilja sum skelti, ið vísir navn og bústað hjá íbúgvum, heiti á fyritøkum, tænastu, virksemi ella vørumerki á tí, ið er at finna á egna øki lýsarans.

1.2.10 Stødd á lýsingarskeltum er at skilja sum heildarstødd á lýsingum, t.e. breidd, hædd o.s.fr. Rúm millum bein á standara/haldara eru íroknað, Frávik kann gerast um hetta ikki spillir heildardámin.

1.2.11 Uppdeiling í umráði og øki í hesi samtykt, byggir á galdandi byggisamtykt fyri Tórshavnar kommunu.

1.2.12 **Miðbýurin í Tórshavn** er her avmarkaður av Havnargøtu, Jónas Broncksgøtu R.C.Effersøesgøtu, Janstovugøtu, Tinghúsvegi, Jústgøtu tvørturum til N.Finsensgøtu, Nonnuskúlan; Heygsbreyt, Dalavegur,Gríms Kambansgøta og báðumegin Sigmundargøtu. Sí hjálagt kortskjal.

1.2.13 **Økið, fevnt av serstøku byggisamtykt fyri Tinganes og Reyn**, er ikki umfatað av hesari reglugerð, og skal viðgerast eftir serligu reglunum í serstøku byggisamtyktini.

1.2.14 **Sundurbýti í ringvegir, sambindingarvegir, býlingsvegir, bústaðarvegir og gøtur**, ið nevndir eru í kap. 6, er samb. byggisamtyktina kap. 5. um vegir, og vísandi til arbeiðsnotat hjá ferðslubólkinum hjá teknisku nevnd.
Sí hjálagt kortskjal.

## 2. kap.
## Umsóknir og loyvisveiting

### 2.1 Umsóknir

2.1.1 Ein og hvør, ið ynskir at fáa loyvi til at seta skelti, ella lýsing upp, skal lata undirskrivaða umsókn inn til byggimyndugleikan. Í umsókníni skal tilskilast:

a) Navn, bústaður og telefonnummar hjá tí, ið eigur skeltið ella lýsingina. NB. Bert ánarin av matriklinum kann søkja um loyvi, og hesin hevur alla og endaliga ábyrgd av skeltingini.
b) Matrikulnummar og støðd á matrikli.
c) Heiti á byggisamtyktarøkinum, har sum skeltið skal setast.
d) Mátsett støðumynd av økinum í mátinum 1:500, ið vísir hvar skeltið ella lýsingin skal vera.
e) Flatumynd og tvørskurður í mátinum 1:50 og mynd(ir) av tí ætlaða skeltinum ella lýsingini.
f) Frágreiðing um uppseting, festing og gerð av skeltinum.
g) Góðkenning frá SEV ella Elnevndini, tá ið tað er neyðugt.
h) Navn og bústaður hjá tí, ið framleiðir skeltið ella lýsingina.
i) Undirskrivað samtykki frá møguligum sameigara.
j) Aðrar upplýsingar, sum byggimyndugleikin krevur.

2.1.2 Skelti og útgerð skulu gerast av eini av byggimyndugleikanum góðkendari fyritøku.

### 2.2 Loyvisveiting

2.2.1 Byggimyndugleikin veitir loyvi til skelti og lýsingar, um umsóknin uppfyllir treytirnar í hesi reglugerð.

2.2.2 Byggimyndugleikin kann heimila uppseting av fyribilsskeltum. Hesi mugu ikki setast upp fyrr enn 4 vikur frammanundan ávísum tiltaki og skulu takast niður í seinasta lagi 2 dagar eftir tiltakið.

2.2.3 Byggimyndugleikin kann veita tíðaravmarkað loyvi til skelti og lýsingar.

2.2.4 Byggimyndugleikin kann, fyri ánarans rokning, taka niður skelti, ið ikki lúka omanfyri nevndu treytir.
2.2.5 Loyvishavarin ábyrgdast at skelti, til eina og hvørja tíð, er í fullgóðum standi, m.a. um tað er brotið, um tað veitur skeivar upplýsingar ella misprýðir.

## 3. kap.
## Eftirlit

### 3.1 Eftirlit

3.1.1 Byggimyndugleikin hevur eftirlit við loyvum, skeltum og lýsingum. Byggimynduleikin skal veita trygd fyri at uppsettu skeltini samsvara við loyvini, og skulu gera umsøkjaran varugan við frávik, og hvat ið tørvur er á.

3.1.2 Skeltið og lýsingar, sum eru uppsett uttan neyðug loyvi, verða viðgjørd á sama hátt sum ólóglig bygging.

## 4. kap.
## Skelti, ið eru treytað av loyvum

### 4.1.1 Skelti í bústaðarøkjum. A1-A3 øki.

4.1.1 Á grundøki í bústaðarøkjum skal ikki veitast loyvi til onnur skelti, enn tænastuskelti, sum hoyra til viðkomandi grund og tey skulu svara til niðanfyri nevndu mát:

a) Skelti hjá almennum fyritøkum og stovnum, mugu ikki vera størri enn 2.5m².
b) Ikki mugu vera fleiri enn 1 skelti á hvørjum grundøki.
c) Tænastu- og virkisskelti hjá fyritøkum ella stovnum, mugu ikki vera størri enn 1,0m²
d) Skelti, sum upplýsa um nýbygging og broyting, ella umvæling av bygningum, sum eru staðsett á viðkomandi øki og eru størri enn 2.5m².
e) Skelti, sum vísa skipan av økissundurbýti og eru størri enn 3.0m².

4.1.2 Bert passiv skeltir eru loyvd í bústaðarøkjunum A1, A2, og A3. Teldustýrd flætti- og ljósskelti eru ikki loyvd í bústaðarøkjum.

### 4.2 Skelti á vinnu- ídnaðar- og havnarøkjum. B1-B10

4.2.1 Skelti, ið kunna um heiti, virksemi, vøru, tænastu og avgreiðslutíðir hjá fyritøkum, sum eru á viðkomandi grund og eru størri enn 3,0m².

4.2.2 Skelti, sum upplýsa um nýbygging og broyting, ella umvæling av bygningum, sum eru staðsett á viðkomandi grund og eru størri enn 2.5 m².

4.2.3 Skelti, sum vísa skipan av økissundurbýti og eru størri enn 3.0m$^2$.

4.2.4 Hvørt einstakt skelti má ikki vera størri enn 6.0m$^2$. Samanløgd stødd á skeltum má ikki vera yvir 6.0m$^2$ fyri hvørt grundøki upp á 1000m$^2$.

## 4.3 Skelti í miðstaðar- handils- og tænastuøkjum,C1- C3 og D3.

4.3.1 Á grundøki í miðstaðar – handils- og tænastuøkjum í Tórshavn, skal ikki veitast loyvi til onnur skelti, enn tænastu- og lýsingarskelti, sum hoyra til viðkomandi grund og tey skulu svara til niðanfyri nevndu mát:

f) Skelti hjá almennum fyritøkum og stovnum, mugu ikki vera størri enn 2.5m$^2$.
g) Tænastu- og virkisskelti hjá fyritøkum ella stovnum, mugu ikki vera størri enn 6,0m$^2$.
h) Skelti, sum upplýsa um nýbygging og broyting, ella umvæling av bygningum, sum eru staðsett á viðkomandi øki og mugu ikki vera størri enn 2.5m$^2$.
i) Skelti, sum vísa skipan av økissundurbýti og mugu ikki vera størri enn 3.0m$^2$.

4.3.2 Hvørt einstakt skelti má ikki vera størri enn 6.0m$^2$. Samanløgd stødd á skeltum má ikki vera yvir 8,0m$^2$, fyri hvørt grundøki upp á 1000m$^2$.

4.3.3 Teldustýrd flætti- og ljósskelti kunnu loyvast í miðstaðar – handils- og tænastuøkjum í Tórshavn.

4.3.4 Ikki er loyvt at spenna bordar ímillum hús og /ella yvir um gøtur í miðøkjum og á handils- og tænastuøkjum, uttan við serstøk høvi og við loyvi frá myndugleikunum.

## 4.4 Skelting í miðbýnum í Tórshavn. (serligt øki, sí hjálagt kortskjal)

4.4.1 Miðbýurin í Tórshavn, er avmarkað á kortskjali. Tórshavnar býráð letur við hesi reglugerð upp fyri, at ein liberalisering av vanligu skeltisásetingunum fyri restina av kommununi, kann fara fram í miðbýnum. Býráðið metir við hesum, at miðbýurin eigur at kunna húsa skelting og lýsingamiðlum á sama støðið sum høvuðsstarbýirnir í okkara grannalondum. Tó so, at skelting av størri týdningi, sambært meting kommununar, skal leggjast fyri byggi- og býarskipanarnevndina til støðutakan.

4.4.2 Fyri at loyvi verður veitt í miðbýnum í Tórshavn skal skeltið fella væl inn í umhvørvið og hóska til byggistílin á húsunum, bæði í formi, skapi og liti.

4.4.3 Hvørt einstakt skelti má ikki vera størri enn 6.0m$^2$. Samanløgd stødd á skeltum má ikki vera yvir 8,0m$^2$, fyri hvørt grundøki uppá 1000 m$^2$.

4.4.4 Teldustýrd flætti- og ljósskelti kunnu loyvast í miðbýnum í Tórshavn.

4.4.5 Fríttstandandi skelti, sum ikki bert eru tænastuskelti, eru loyvd í miðbýnum í Tórshavn.

4.4.6 Tænastuskelti mugu ikki vera størri enn 1,5m². Onnur einstøk skelti mugu ikki vera størri enn 2,5 m².

4.4.7 Ikki er loyvt at spenna bordar ímillum hús og/ella yvir um gøtur í miðbýnum, uttan við serstøk høvi og við loyvi frá myndugleikunum.

4.4.8 Serligt loyvi krevst til skelti í býarpartinum fevnt av serstøku byggisamtykt fyri Tinganes og Reyn, sí pkt. 2.12.

**4.4.9 Skelti á friðaðum økjum, viðarlundum, frílendi, náttúru-almennum urtagarðs- og spæliøkjum og D1 og 4. grundumráði.**

4.4.10 Upplýsingarskelti, mugu ikki vera størri enn 2,1 m². Øll onnur skelti eru ikki loyvd. Fyribilsskelti kunnu loyvast , sí 3.2.2.
(víst verður til skeltiuppskotið hjá Ferðaráð Føroya)

4.4.11 **Á ítróttarøkjum D2** er serstøk reglugerð.

**4.4.12 Fyribilsskelti.**

4.4.13 Øll fyribilsskelti eru treytað av loyvum. Um stødd og staðseting teirra galda somu reglur, sum eru galdandi um onnur skelti.

## 6. kap.
## Skelti, ið eru forboðin.

**6.1.1 Skelti á friðaðum økjum, viðarlundum, frílendi, náttúruøkjum, almennum urtagarðs- og spæliøkjum, D1og 4.grundumráði.**

6.1.2 Teldustýrd flætti- og ljósskelti eru ikki loyvd á friðaðum økjum, viðarlundum frílendi, náttúru- almennum urtagarðs- og spæliøkjum.

6.1.3 Á friðaðum økjum, viðarlundum, frílendi, náttúru- almennum urtagarðs- og spæliøkjum eru bert loyvd skelti, ið upplýsa um friðing, gonguleiðir, staðarnøvn, hentleikar og kunning um søgu og náttúru á økjunum. Somuleiðis skelti, ið kunna um bann fyri motorakførum, súkklum, hestum og hundum.

6.1.4 Á ítróttarøkjum D2 er serstøk reglugerð.

**6.1.5 Skelti við ring- og sambindingarvegir**

6.1.6 Skelti, ið ikki eru ferðslu og vegvísaramerki eru ikki loyvd á økjunum, ið hoyra til ring- og sambindingarvegir.

6.1.7 Ikki er loyvt at seta lýsingarskelti á haldarar, ið venda ímóti ring- og sambindingarvegum v.m. og eru minni enn 50 m frá vegamótum. Skelti mugu ikki vera minni enn 20 m frá ferðslutalvum ella vegvísarum ella øðrum ferðsluútbúnaði. Har sum mest loyvda ferð á vegi er 50km/t, má lýsingarskelti á haldara ikki vera minni enn 30 m frá ferðslu- ella vegvísarum ella øðrum ferðsluútbúnaði. Og um mest loyvda ferð er 80 km/t, má tað ikki vera minni enn 40 m frá.

6.1.8 Á grundøki, har sum markið er út móti ring- ella sambindingarvegi er ikki loyvt at hava fleiri enn eitt sjálvstøðugt skelti á tí partinum av einum grundøki, ið vendir móti vegnum, uttan so at grundin er longri enn 100m samsíðis við vegin.

6.1.9 Skelti, ið venda ímóti ring- og sambindingarvegum, og ikki eru tænastuskelti fyri viðkomandi grund, eru ikki loyvd.

**6.1.10 Skelti við býlings- og bústaðarvegir.**

6.1.11 Á grundum, ið liggja við býlings- og bústaðarvegir, er ikki loyvt at seta lýsingarskelti, størri enn 0,5 m², og ikki nærri enn 50 m frá vegamóti. Skelti mugu ikki vera minni enn 20 m frá ferðslu- og vegvísarum ella øðrum ferðsluútbúnaði.

6.1.12 Ikki er loyvt at hava fleiri enn eitt sjálvstøðugt skelti á tí partinum av eini grund, ið vendir ímóti vegnum, uttan so at grundin er longri enn 70m samsíðis við vegin.

6.1.13 Flættiskelti og ljósskelti eru ikki loyvd á grundum við býlings- og bústaðarvegir.

**6.1.14 Trygd**

6.1.15 Skelti mugu ikki vera soleiðis háttað, at tey líkjast vegvísarum og øðrum ferðslumerkjum á nakran hátt, ella staðsett soleiðis, at tey forða útsýni við gonguteigar og innkoyringar. Um broytingar verða á vegamótum ella neyðugt verður at broyta ferðslumerkingar, skulu eigarar av skeltunum flyta tey, so at tey uppfylla viðtøkurnar í hesi samtykt.

## 7. kap.
## Almennar viðtøkur.

### 7.1 Reglugerðir

7.1.1 Viðtøkur í **Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu**, eru galdandi fyri skelti og lýsingar sambært hesi samtykt.

7.1.2 Byggimyndugleikin veitir loyvi til flættiskelti og ljósskelti. Slík skelti kunnu bert loyvast á líðugt bygdum økjum. Tá ið loyvið verður veitt, skal ansast eftir at skeltið fellur so væl inn í umhvørvið, sum til ber, og serliga skal ansast eftir sniðgevingini. Á

flættiskeltum og ljósskeltum skal ikki ganga longur enn 20 sek. frá tí at ein lýsing verður víst, til tann næsta verður víst. Tað sama er galdandi fyri teldustýrd ljósskelti, sum nýta rørslumyndir.

## 7.2 Grundeigarar

7.2.1 Tað er neyðugt at hava loyvi frá grundeigaranum, til at kunna seta skelti ella lýsing upp á einum grundøki. Tá ið talan er um skelti, ið eru treytað av loyvum, skal byggimyndugleikin krevja, at umsøkjarin hevur skrivligt samtykki frá grundeigaranum. Byggimyndugleikin skal geva grannum møguleika at úttala seg um umsóknina at seta skelti upp, um hann heldur, at áhugi kann vera fyri tí. Hann kann eisini krevja av umsøkjaranum, at hann skal hava grannaloyvi.

7.2.2 Skelti skulu vera sett innanfyri mark á viðkomandi grundøki. Serligt loyvi krevst um skeltið kemur út um grundøkismark. Tórshavnar kommuna hevur heimild at seta skelti upp á almennari ogn uttan fyri grundøki, um tey tæna ávísum tørvi.

## 7.3 Tillaging

7.3.1 Við sniðgeving av skeltum skal fyrilit takast fyri nærumhvørvi og hjáliggjandi bygningum og ansast skal eftir, at skeltini verða lagað eftir teimum skeltum, ið frammanundan eru á grundini og nøgd teirra.

## 7.4 Mest loyvda hædd og uppstilling av skeltum.

7.4.1 Hægsta punkt á skeltinum ella skeltastandaranum má ikki vera hægri enn takskeggið á húsunum, ið liggja næst við.

7.4.2 Skelti, ið er fest á skeltastandara, hús ella annað, má ikki vera lægri enn 2,60m frá gongubreyt og ikki hægri enn 4,20m frá gøtuni. Serligt loyvi krevst um skeltið kemur út um grundøkismark.

# 8. kap.
# Fyribilsviðtøkur

## 8.1 Eldri skelti

8.1.1 Byggimyndugleikin kann krevja, at eldri skelti, sum eru sett upp uttan loyvi, áðrenn henda samtyktin kom í gildi, skulu takast burtur, um hann metir at tey órógva ferðslu, ella skemma umhvørvið. Annars skulu hesi skelti viðfarast sambært viðtøkum í byggisamtyktini, politiviðtøkunum fyri Tórshavn, Ferðslu-, Náttúrufriðingar- og Skógfriðingarlógini og samb. kunngerð um um kommunala byggimálsviðgerð.

8.1.2 Byggimyndugleikin skal við kunngerð geva eigarum av ikki loyvdum skeltum, møguleika at søkja um loyvi til teirra innan ½ ár frá tí at lýsingin varð almannakunngjørd. Í lýsingini frá byggimyndugleikanum skal staðfestast, at tá ið

freistin er úti, kann byggimyndugleikin, uttan aðra ávaring, taka skeltini niður fyri eigarans rokning.

8.1.3 Byggimyndugleikin kann í serligum førum veita undantaksloyvi frá 8.1.2.

## 9. kap.
## Heimild til undantøk

### 9.1 Heimild til undantøk

9.1.1 Byggimyndugleikin kann gera undantøk frá viðtøkunum um staðseting og stødd á skeltum, tá ið serligar umstøður tala fyri hesum. Tilsøgn frá byggi- og býarskipanarnevnd og ferðslunevnd/ umhvørvisnevnd, friðingarnevndum, og Føroya Landsstýri er neyðug, um byggimyndugleikin metir tað.

## 10. kap.
## Revsiviðtøkur.

### 10.1 Revsiviðtøkur

**10.1.1** Um onkur ikki ger eftir boðum frá byggimyndugleikunum innan ásettu freist, ella á annan hátt ger ímóti viðtøkunum í hesi samtykt, kann byggimyndugleikin seta í verk viðtøkur í 1. Kap. § 8 í **Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn.**

## 11. kap.
## Gildisviðtøkur

### 11.1 Gildisviðtøkur

11.1.1 Tá ið henda samtykt kemur í gildi, falla tær reglur úr gildi, sum hava verið galdandi um gerð og staðseting av skeltum. Politiviðtøkan og ferðslulógin og aðrar avvarðandi lógir eru ikki settar úr gildi

## Ískoyti I
## Útgreining

## 1. kap.
## Endamál

1.1 At hava eftirlit við nøgd, gerð, stødd, uppseting og staðseting av skeltum í Tórshavnar kommunu, soleiðis at tey ikki hótta trygd teirra, ið koyra og ganga, at tey ikki eru borgarum í býnum til ampa ella ónáðir og at tey ikki hava skemmandi ávirkan á umhvørvi og útsjónd býarins.

1.1.2 At lætta um avgreiðslu av umsóknum um skelti.

**2. kap.**
**Hvussu endamálið kann náast.**

2.1 **Trygd.**

2.1.1 Til at forða fyri, at skelti hótta trygd teirra, ið koyra og ganga, eru viðtøkur um fjarstøðu skeltanna frá krossgøtum og vegkantum. Við flættiskeltum er tikin hædd fyri, hvussu títt myndirnar á teimum skulu skifta. Bordar, sum verða spentir yvir um gøtu ella veg, eru ikki loyvdir uttan serstaka viðgerð. Viðtøkur um hædd á skeltum frá gongubreyt í miðbýnum og hvussu langt tey mega koma út frá húsaveggi, eru serliga gjørdar við trygdini hjá teimum gangandi í huga.

2.2 **Íbúgvar.**

2.2.1 Í reglugerðini eru viðtøkur um grannarættindi. T.v.s. at íbúgvar, sum búgva í nánd av, har ætlan er um at seta eitt skelti upp, verða kunnaðir um hetta frammanundan, og at teir kunnu gera viðmerkingar til val av staði, har skeltið/ lýsingin skal standa, og/ella snið og uppseting tess. Staðseting og snið eigur ikki at skerja rættindi íbúgvanna til útsýni ella vera teimum til ampa á annan hátt.

2.3 **Umhvørvið og útsjónd býarins.**

2.3.1 Fyri at eitt skelti ikki skal skemma umhvørvið og útsjónd býarins, eru viðtøkur í reglugerðini um nøgd av skeltum, stødd, og tíðartreytir fyri hvussu leingi fyribilsskelti kunnu standa. Umframt tað, er avgjørt at ansast skal eftir tillaging eftir umhvørvinum, tá ið skelti verða sett upp, við serligum atliti til litir, ljós, stødd og lesifráleika.

2.4 **Avgreiðsla.**

2.4.1 Reglurnar gera av hvørji skelti/lýsingar eru treytað av loyvum og hvørji ikki, soleiðis at mál ikki koma til avgreiðslu hjá byggimyndugleikunum, uttan so at neyðugt er.

**Ískoyti II**
**Skelti, ið ikki eru treytað av loyvum.**

**1.1 Skelti á bústaðarøkjum.**

1.1.1 Skelti, ið vísa navn og bústað íbúgvanna á eini grund og ikki eru størri enn 0,1 m².

1.1.2 Skelti hjá fyritøkum og almennum stovnum í íbúðarøkjum, sum upplýsa navn og virksemi hjá fyritøkuni/stovninum og ikki eru størri enn 1.0 m².

1.1.3 Skelti, ið lýsa við sølu ella leigu av ogn og ikki eru størri enn 0,5 m², og bert eitt á hvørjari ogn. Orðið ogn, er at skilja sum matrikkulnummar.

1.1.4 Skelti, ið upplýsa um nýbygging og broyting ella umvæling av bygningum, og standa á viðkomandi grundøki og ikki eru størri enn 2.0 m². Á skeltunum kann í mesta lagi standa heiti á bygninginum, tekningar av honum, nøvn á arkitektum, arbeiðstakarum og húsabyggjarum og nær arbeiðið eftir ætlan skal vera liðugt. Skeltini skulu takast niður, tá ið arbeiðið er av. Byggimyndugleikin kann gera av, nær hann metir arbeiðið vera liðugt.

1.1.5 Skelti, ið vísa uppdeiling av einum øki og ikki eru størri enn 3.0 m². Loyvi skal bert vera givið til eitt skelti á hvørjum øki og tað má ikki setast upp, fyrr enn uppdeilingin er samtykt. Tað má ikki standa uppi í meira enn eitt ár.

## 1.2 Skelti á D3 - økjum, almennir stovnar

1.2.1 Skelti, ið upplýsa um heiti, virksemi og avgreiðslutíð hjá stovnum og ikki eru størri enn 1,0 m².

1.2.2 Skelti, ið lýsa við sølu ella leigu av bústaði á stovnsøkjunum og ikki eru størri enn 0,5 m² og bert eitt á hvørjari ogn/ matrikkulnummari.

1.2.3 Skelti, ið upplýsa um nýbygging og broyting ella umvæling av bygningum, eru staðsett á viðkomandi grundøki og ikki størri enn 2,5 m². Á skeltunum kann í mesta lagi standa heiti á bygninginum, tekningar av honum, nøvn á arkitektum, arbeiðstakarum og húsabyggjarum og nær arbeiðið eftir ætlan verður liðugt. Skeltið skal takast niður tá ið arbeiðið er liðugt. Byggimyndugleikin kann gera av, nær hann metir arbeiðið vera liðugt.

1.2.4 Annars eru øll tey skelti og lýsingar, sum ikki eru treytað av loyvum á íbúðarøkjum, heldur ikki treytað av loyvum á stovnsøkjum.

## 1.3 Skelti á vinnu- ídnaðar- og havnarøkjum.

1.3.1 Skelti, ið kunna um heiti, virksemi, vøru, tænastu og avgreiðslutíð hjá fyritøkum á viðkomandi grundøki og ikki eru størri enn 3,0 m².

1.3.2 Annars eru øll tey skelti, ið ikki eru treytað av loyvum á stovnsøkjum, heldur ikki treytað av loyvum á arbeiðs-, ídnaðar- og havnarøkjum.

## 1.4 Skelti í miðbýnum í Tórshavn, miðstaðar- handils- og tænastuøkjum.

1.4.1 Øll skelti og lýsingar, ið ikki eru treytað av loyvum á stovnsøkjum, eru heldur ikki treytað av loyvum í miðbýnum í Tórshavn, í miðstaðarøkjum og á handils- og tænastuøkjum.

**1.5 Skelti, á friðaðum økjum, viðarlundum, frílendum, almennum urtagarðs- náttúru- og spæliøkjum, D1 og 4.grundumráði.**

1.5.1 Skelti, ið upplýsa um friðing, gonguleiðir, staðarnøvn, hentleikar og kunning um søgu og náttúru á økinum, og ikki eru størri enn 2,1 $m^2$ .
(sí skeltiuppskot Ferðaráð Føroya)

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Uppskotið til reglugerð um skelting varð lagt fram á fundinum og verður tikin upp aftur á komandi fundi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at reglugerðin verður samtykt, umframt at ískoyti verður staðfest í almennu byggisamtyktini sum lýst omanfyri, og verður fylgiskjal til almennu byggisamtyktina, og at beina málið í býráðið til avgreiðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. januar 2012:** Uppskotið varð lagt fram og nevndin samtykti at taka málið upp aftur á komandi fundi, tá umsitingin greiður nærri frá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2012:** Málið útsett til serstakan fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. mars 2012:** Útsett

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2012:** Partur av reglugerðini varð gjøgnumgingin og samtykt varð at hava eina verkstovu, har reglugerðin verður gjøgnumgingin.

**Býráðið 29. mars 2012:** Tikið av skrá.

**81/12** **<u>2012-0568 BAM</u>**

**Kommunala Brennistøðin - Móttøkuskipan fyri pappír/papp á Hjalla**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunala Brennistøðin hevur leingi ynskt og havt ætlanir um at skipa eina betri móttøku og umlastingarstøð til papp og pappír á Brennistøðini á Hjalla, har ið

møguleiki er at móttaka størri nøgdir av pappi, og at pressa papp og pappír í ballir til beinleiðis útflutnings.
Endamálið er at kunna selja tilfarið beinleiðis, og harvið fáa vinning burturúr, í staðin fyri at gjalda til IRF fyri at sleppa av við tilfarið. Við at betra um fíggjarliga úrslitið, ber til at lækka prísin (og við tíðini kanska at geva pengar) fyri papp/pappír, økist incitamentið fyri at skilja meiri papp og pappír til endurnýtslu.
Ein av forðingunum fyri at seta skipanina í verk hevur verið, at neyðugt er at hava hóskandi høli, har til ber at hava eina pressu, men einki høli hevur verið tøkt, og mett hevur verið, at tað er ov dýrt at leiga eitt høli. Men Kommunala Brennistøðini hevur í seinastuni eisini arbeitt við at umleggja flutningin og viðgerðina av vandamiklum burturkasti, soleiðis at minni tørvur verður á goymsluhøli til vandamikið burturkast. Ætlanin er so at nýta hølið, sum higartil hevur verið nýtt til goymslu av vandamiklum burturkasti, til at pressa papp og pappír.
Umboð fyri Kommunalu Brennistøðina hava í februar í ár verið og hugt at trimum ymsum pressum, ið vórða mettar at vera egnaðar til okkara tørv. Útfrá hesum er funnið fram til eina pressu, sum verður mett at verða mest hóskandi. Aftrat sjálvari pressuni skal nakað av útgerð útvegast, t.d. goymslubingjur til ballur, og nýggjar móttøkubingjur á Endurnýtsluni.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Kostnaðarmetingin fyri íløguna (pressu, flutning, uppseting, ymsa útgerð og ókent), er mett til umleið 0,6 mió. Víst verður til skjal nr. 2012-0568/1 fyri nærri útgreining.
Raksrarúrslitið av endurnýtsluskipanini fyri papp og pappír verður sambært kalkulatiónum mett at batna við millum 0,1 - 0,3 mió. árliga, við óbroyttum nøgdum, og teimum søluprísum, sum vit hava fingið upplýst frá Danbørs. Søluprísunum er tó skiftandi, og tí er torført at siga neyvt, hvussu úrslitið verður. Í kalkulatiónini er eisini innroknað avskriving av íløguni yvir 10 ár, umframt lønarútreiðslur (14 tímar pr. viku), men ætlanin er at nýta verandi starvsfólkahóp, og tí koma ikki eyka lønarútreiðlsur til hesa ætlanina. Víst verður annars til skjal nr. 2012-0568/1 fyri nærri útgreining.

Leiðarin á Kommunalu Brennistøðini metir ikki, at fíggjarligt rúm er á rakstrarjáttanini fyri 2012 hjá Kommunalu Brennistøðini. Leiðarin á kommunalu Brennistøðini søkir tískil um játtan á 0,6 mió. av íløgum til ætlanina, soleiðis at farast kann undir at fremja ætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Kommunalu Brennistøðina mæla til, at játta kr. 0,6 mió. av íløgum fyri 2012, § 7, 7175, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. mars 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og at játta kr. 0,6 mió. av íløgum fyri 2012, § 7, 7175.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**82/12** **2011-1750 (sí eisini mál nr 2010-1277)**

**Býarskipan fram við Marknagilsvegnum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við breiðkanina av Maknagilsvegnum, hevur verið neyðugt at umskipa nógvar av teimum verandi vega-íbindingunum fram við ringvegnum, tí kommunan hevur kravt, at Marknagilsvegurin skal vera fasaduleysur. Ein avleiðing av hesum kravi, ið m.a. liggur til grund fyri tryggleikanum í ferðsluni er, at fleiri vegaíbindingar av verandi útstykkingum eins og komandi útstykkingarætlanir hava verið viðgjørdar í umsitingini. Úrslitið av hesi dagføring hevur áður verið framlagt í teknisku nevnd 25. august 2011 og byggi- og býarskipanarnevndini 29. august 2011 (sí mál nr. 2010-1277), har tað var heimilað umsitingini at taka upp samráðingar við teir eigarar, sum verða ávirkaðir av uppskotinum til loysn.

Umsitingin hevur havt samráðingar við teir eigarar, ið hava verið ávirkaðir av framlagda uppskotinum (j nr. 2010-1277/36). Samskift hevur verið við:

1. Finnbogi Arge, eigari av matr. nr. 1225, Tórshavn, sum sambært skjali j. nr. 2010-1277/40 upplýsti, at hann sum heild kann taka undir við framlagda uppskoti
2. Óli Hammer v.fl., eigarar av matr. nr. 1224a, Tórshavn. Ì sambandi við tilgongdina í útstykkingarætlanini (mál nr. 2007-3218) á matr. nr. 1224a, Tórshavn, hevur samskifti verið millum Óla Hammer og umsitingina. Útstykkingin er liðugt gjørd og góðkend og í sambandi við yvirtøku av íbúðarvegum, setti kommunan sum treyt, at atlit skudu verða tikin fyri framtíðar ústykkingum eystanfyri, sambært skjali nr. j nr. 2010-1277/36. Í teldubrævasamskifti við umsitingina, sambært skjali j. nr. 2011-2170/9, hevur Óli Hammer boðað frá, at tey taka undir við ásettum treytum og sostatt taka undir við framlagda uppskotinum.
3. Rúni og Regin Árting, eigarar av matr. nr. 1223l, Tórshavn, sum sambært skjali j. nr. 2011-1750/11, heldur ikki taka undir við uppskotinum. Sambært teirra áskoðan hevur kommunan gjørt avtalu við teir um at Kongsgil einans er ætlað til ferðslu frá 3 traðum samanlagt.

4. Magnus Jacobsen, eigari av matr. nr. 1226a, Tórshavn, sum sambært skjali j. nr. 2011-1750/10, ið er sent kommununi, als ikki tekur undir við uppskotinum, men mótmælir ætlanini.
5. Magnus Paula Gaard, eigari av matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn. Ì sambandi við tilgongdina í útstykkingarætlanini á matr. nr. 1227a og 1228a, Tórshavn, hevur nógv samskifti verið millum Magnus Paula Gaard og umsitingina. Sambært skjali j. nr. 2011-2404/6 hevur samskifti í høvuðsheitinum tikið útgangsstøði í atkomu frá Dalakróki og at hædd er tikin fyri framtíðar atkomumøguleikum til ognina hjá Magnus Jacobsen, vestanfyri (matr. nr 1226a, Tórshavn) umframt ognina hjá arvingunum eftir Gudrun Rubeksen eystanfyri (matr. nr. 877a og 877f, Tórshavn).
6. Hjørdis Margrethe Rubeksen Milad dóttir Gudrun Rubeksen, sálu, eigari av 877a og 877f, Tórshavn. Ì telefonsamrøðu er greitt fyri henni, hvørjar ætlanir kommunan hevur á økinum. Víst verður til notat j. nr. 2011-1750/5. Ongar viðmerkingar eru komnar síðani.

Eftir at umsitingin hevur móttikið omanfyri standandi viðmerkingar, hevur málið enn einaferð verið viðgjørt í umsitingini. Aðrir møguleikar hava verið umrøddir, men umsitingin metir ikki, at viðmerkingarnar hava givið orsøk til at broyta uppskotið til heildarloysn fyri økið. Víst verður í hesum sambandi til notat í málinum (j. nr 2011-1750/12).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við upprunaliga uppskotinum (j nr. 2010-1277/36) til samlaða ætlan fyri økið og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið til støðutakan, og at kommunan tekur neyðug stig til, at ætlanin kann fremjast – herundir møguliga ognartøku av privatum vegum.

**Tekniska nevnd 15. mars 2012:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Jákup Símun Simonsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Tekniska nevnd 15. mars 2012:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Jan Christiansen og Jákup Símun Simonsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd 15. mars 2012.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2012:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Elin Lindenskov, Jan Christiansen og Bogi Andreasen samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti Jógvan Arge tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen, mælir býráðnum til at taka undir við uppskotinum til samlaða ætlan fyri økið og taka neyðug stig til, at ætlanin kann fremjast, herundir nýta heimildina til at yvirtaka part av Kongsgil sbr. ásetingini í §8 í tinglýstu deklaratiónini á matr. nr. 1223 (nú matr. nr. 1223l), Tórshavn.

Ein minniluti: Jógvan Arge tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 29. mars 2012:** Atkvøtt varð um meirlutatilmæli í fíggjarnevndini, ið var samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Bogi Andreasen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøddu: Jógvan Arge og Jákup Símun Simonsen.

**83/12** **2012-0785**

**Yvirlýsing: Tórshavnar Býráð mótmælir, at Vinnuháskúlin ella partar av skúlanum flyta úr Tórshavnar kommunu**

**Býráðið 29. mars 2012:** Býráðið samtykti einmælt at gera soljóðandi yvirlýsing:

**Yvirlýsing**

**Tórshavnar býráð mótmælir, at Vinnuháskúlin ella partar av skúlanum flyta úr høvuðsstaðnum, Tórshavn**

Í 2010 boðaði landsstýrið frá avgerð at flyta fleiri maritimar útbúgvingar á Vinnuháskúlanum í Tórshavn til Klaksvíkar.

Á fundi hin 8. desember 2010 mótmælti Tórshavnar býráð harðliga hesi skaðiligu niðurlaging av Vinnuháskúlanum og harvið allari teirri maritimu útbúgvingarskipanini í Føroyum.

Enn valdar ótolandi óvissa og ótryggleiki um framtíðina hjá Vinnuháskúlanum. Javnan frættist eisini um tilvildarligar ætlanir at niðurlaga og flyta aðrar útbúgvingar úr Havnini. Tórshavnar býráð mótmælir harðliga hesi gongd.

Øll faklig tilmæli og skilvís hugsan vísa greitt, at neyðugt er at styrkja um útbúgvingarskipanina og savna fakliga førleikan. Hetta fevnir bæði um miðnámsútbúgvingar, hægri útbúgvingar og gransking.

Føroyska samfelagnum tørvar harumframt ein veruligan útbúgvingar- og universitetsbý, skulu vit standa okkum í altjóða kappingini. Tórshavnar býráð er ikki í iva um, at bestu fortreytir fyri at røkka hesum eru í høvuðsstaðnum.

Vinnuháskúlin og maritimu útbúgvingarnar í Tórshavn hava høgt altjóða støði, men tað er skjótt at bróta hetta niður.

Tórshavnar býráð heitir tí staðiliga á landsmyndugleikarnar um nýggja og framskygda kós fyri Vinnuháskúlan í Tórshavn, Fróðskaparsetrið eins og útbúgving og gransking í síni heild. Tórshavnar býráð bjóðar somuleiðis øllum pørtum samstarv at menna høvuðsstaðin, Tórshavnar bý, sum útbúgvingarmiðdepil og altjóða universitetsbý.

# Mál uttan fyri skrá.

**84/12** **1999-1642**

**Golfvøllurin**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Ætlanin er, at stórur partur av flagnum og undirliggjandi tilfar frá Tórsvølli skal flytast út á golføkið á Glyvursnesi. Tað verður Tórshavnar Golfklubbi, sum ger neyðugu fyrireikingarnar at taka ímóti nógva tilfarinum. Partur av hesum er at leggja dren, at javna økið og leggja onkran arbeiðsveg.

Í hesum sambandi søkir Golfklubburin um at leysgeva part av játtanini à 3,3 mió kr., sum felagið fekk í stuðli í 1999. Søkt verður um 250.000 kr. Sjálvt arbeiðið at leggja flagið verður gjørt vi sjálvbodnum arbeiði.

Útreiðslur í sambandi við flutning frá Tórsvølli verður fíggjað av Tórsvallar-verktætlanini. Í útboðstilfarinum skal lýsast neyvt, hvussu flag og tilfar skal fáast upp og leverast á Glyvursnesi, so at klubburin kann arbeiða hetta víðari.

Nevnda játtan á 3,3 mió er ikki beinleiðis tøk á fíggaræltanini, og rúm er ikki fyri játtanini á kontu 5370 Stuðul til íløgur. Hinvegin er játtan 5 mió kr. sett av á íløguætlanini til golfvøll. Av tí at hetta arbeiðið er at meta sum partur av nýggjum golfvølli, er skilabest, at stuðulin verður játtaður av hesi játtan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Tórshavnar Golfklubba 250.000 kr. í stuðli til at gera fyrireikingar úti á Glyvursnesi at leggja flag og tilfar frá Tórsvølli av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 29. mars 2012:** Sambært nýggjari kostnaðarmeting verður fíggjartørvurin hjá felagnum til fyrireikingararbeiðið á Glyvursnesi 400.000 kr., og nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta Tórshavnar Golfklubba upp til hesa upphædd av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játta Tórshavnar Golfklubba upp til 400.000 kr. av konto 5775 Ítróttaranlegg.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt

**FUNDUR LOKIN KL. 20:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Rúni Djurhuus | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |